# Í FØROYUM





## Tekniski skúli í Klaksvík
### Matvøruútbúgving

Matvøruútbúgvingin er ein nýggj útbúgving, sum Tekniski skúli bjóðar. Í summar verða fyrstu matvørunæmingarnir lidnir. Útbúgvingin er skipað sum eitt støðisár, sum gevur næmingunum førleika at koma í læru sum gastronomihjálpara.

Ætlar tú at fara víðari eftir fyrsta støðisárið, krevur tað, at tú hevur eitt lærupláss. Hevur tú tað, kanst tú taka eina knapt trý ára langa yrkisútbúgving innan matvøru, har skúlaparturin tó er í Danmark. Tekniski skúli hevur avtalu við Aalborg Food College um skúlagongdina á framhaldsútbúgvingunum.

Tey, ið hava tørv á matvøruútbúgvingini eru kokkar, tænarar, smyrjibreyðsjomfrúir, bakarar og føðsluhjálparar.

## Tekniski skúli í Klaksvík
### HT-útbúgvingin

Á tekniska skúla í Klaksvík eru umfram SIT og vanligu lærlingaútbúgvingarnar eisini ein HT-útbúgving. Hetta er ein trý ára long útbúgving, sum serliga er ætlað teimum, ið hava áhuga fyri at arbeiða við tøkni, bæði verkliga og ástøðiliga. Útbúgvingin er skipað við kravdum lærugreinum og vallærugreinum. Útbúgvingin er í stóran mun myndað av verkætlanum.





## Tekniski skúlin í Havn
### Plátu- og kontruktiónssmiðjur

Plátu- og konstruktiónssmiðurin er tann smiðurin, »sum dugir alt«, og hevur eina breiða vitan um alt smiðjuøkið.

Plátu- og konstruktiónssmiðurin arbeiðir í høvuðsheitum við at umvæla og framleiða úr stáli, jarni og øðrum metallum. Arbeiði fevnir m. a. um plátuarbeiði úr tunnum og tjúkkum plátum. Til hetta arbeiði verða nýtt bæði hondamboð, automatiskar og teldustýrdar maskinur.

Víðari ber til at útbúgva seg til: maskinmeistara, framleiðslutøkning og verkfrøðing

## Tekniski skúlin í Havn og Klaksvík
### Húsasmiður

Húsamiðurin fæst við at smíða sethús, virkisbygningar og onnur byggiarbeiði. Arbeiðið fevnir um forskalling, gólv, útveggir og takverk. Eisini bjálving, klæðing av húsum, uppseting av køkseingum og øðrum.

Víðari ber til at læra til byggitekninkara, byggifrøðing, byggiverkfrøðing og arkitekt.



## Tekniski skúli í Havn
### Stálskipasmiður

Stálskipasmiðir fáast fyrst og fremst við at byggja stálskip, men gera eisini arbeiði á virkjum og innan flutning og byggivirksemi.

Arbeiðið fevnir millum annað um tilgerð av konstruktiónum úr plátum, rørum og profilum í ymsum tjúgdum. Útbúgvingin endar við sveinaroynd.

Víðari kann lærast til: maskinmeistara, framleiðslutøkning og verkfrøðing



*Ingelin Strøm og Halla Jacobsen, føroyingar á Wold College*

## United World College í Noregi

**Ingilin Strøm, næmingur á RCNUWC í Noregi**

Djúpt inni í Dalsfjørðinum í tí norska fylkinum Sogn og Fjordane liggur ein lítil bygd nevnd Flekke, har umleið 250 fólk liva friðarliga og virka fyri dagligt breyð. Ein skuldi ikki trúð tí, tá ein koyrir eftir tí kringluta vegnum framvið bygdini, men smáar 2,5 km norðanfyri lítla bygdasamfelagið finnur tú ein heilt serligan skúla, nevniliga Red Cross Nordic United World College, styttur RCNUWC. Á RCNUWC ganga á leið 200 næmingar frá fleiri enn 80 londum, alt frá Nepal til Peru og sjálvandi eisini úr Føroyum.

Í 1996, tá skúlin varð settur á stovn, gjørdi Føroya Landsstýri av, at Føroyar eisini skuldu taka lut í samstarvinum. Ein føroyskur næmingur verður valdur á hvørjum ári, soleiðis at tveir næmingar altíð ganga á skúlanum í tí 2 ára útbúgvingini. Fyri at sleppa inn á 2 ára útbúgvingina mást tú vera liðugur við fyrsta árið í eini gymnasialari miðnámsútbúgving.

Skúlin virkar fyri, at útbúgving skal vera ein megi, ið sameinir fólk. Hann er merktur av, at fólk úr øllum heiminum eru savnað fyri at læra og liva saman. Næmingarnir eru hýstir 5 í hvørjum kamari, og teir eru settir saman tvørtur um landamørk. Hetta merkir, at ikki einans skulu næmingarnir læra seg at taka hædd fyri mentunarligum ymiskleikum í arbeiðsumstøðum men eisini í vanligum sosialum lívi. Fólk úr Kanada og Tanzania verða tínir tættastu vinir og familja. Lærararnir eru somuleiðis úr øllum heiminum, og búgva teir saman við teirra familjum á skúlans øki.

Fakliga støðið á skúlanum er høgt. Lestrarætlanin er løgd eftir International Baccalaureate (IB) fortreytum, ið er eitt krevjandi tvey ára pensum. At lesnaðurin er krevjandi, merkir ikki bara, at tú hevur fleiri fakta at minnast, fleiri bøkur at lesa og fleiri skúlatímar enn á øðrum skúlum. Áherðsla verður eisini løgd á m.a. at duga at seta krevjandi spurningar og at læra um sjálvt tað at læra, soleiðis at tú verður brynjaður til víðari lesnað. Harafturat snýr útbúgvingin seg um meiri enn tað, sum stendur á endaliga próvnum. Tað verður kravt av tær, at tú letur teg draga inn í tiltøkini, ið fara fram uttanfyri skúlan (EACs), og sum hava nógv at týða fyri, hvussu tín útbúgving verður myndað. Eins ymisk og vit menniskju eru, so ymisk eru tey tiltøkini, ið tú kanst velja ímillum. Tú kanst t.d. velja at skipa fyri fríggjadagscaféini Snikkarbua, spæla kamartónleik, skipa Reyða Kross og Amnesty virksemi, spæla sjónleik; stutt sagt er hugflogið tann einasta avmarkingin, tí næmingarnir hava stórt frælsi til at gera verkætlanir, ið teir sjálvir brenna fyri.

Nettupp frælsi setur sín dám á skúlan, tí umstøðurnar eru snøgt sagt stak góðar. Skúlin hevur høli til tónleik, sjónleik og málningalist, framúr góða útgerð til náttúruvísundarligu lærugreinirnar, svimjihøll, fitness sentur, og Noreg gevur tær møguleika til at standa á skí stóran part av skúlaárinum.

RCNUWC savnar ungfólk úr øllum heiminum, hvørt við sínum sjónarmiðum á hvussu heimurin sær út, í tí vón, at hesi ungfólkini í framtíðini kunnu gera eitt arbeiði, ið onkursvegna kann gera ein mun. Næmingarnir eru í roynd og veru ambassadørar fyri teirra lond. Skúlin hevur til endamáls at útbúgva næmingar, ið eru tilvitaðir um umhvørvislig og menniskjalig greiðsluevni, og sum vilja involvera seg í samfelagnum. Tolsemi og samkensla eru eginleikar, sum skúlin leggur dent á at leggja í næmingarnar við tí vón, at tað ber til at skapa ein betri heim.

### Mentamálaráðið rindar fyri ein føroying árliga

*Næmingar, sum ganga á 1. ári á eini gymnasialari útbúgving kunnu søkja Mentamálaráðið um upptøku á RCNUWC. Umsóknarblaðið fæst á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum. Ein føroyskur næmingur fær árliga stuðul at ganga á United World College, soleiðis, at tað altíð eru tveir føroyingar á skúlanum: ein á fyrra árinum og ein á seinna árinum.* ***Seinasta freist at søkja er 7. mars 2011.***